# LIGT



» Høvuðsendamálið er, at tað má bara ikki vera í Havn
HEÐIN MORTENSEN

# Seinasta orðið er ikki sagt

– Hetta má halda uppat.

Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn sigur, at hann hevur ikki orð fyri, hvussu langt úti hann heldur avgerðin er um at flyta íbúðirnar til sinnisveik úr Havn til Sandavágs.

– Eg haldi, at ein slík íbúðarbygging eigur at vera beint við psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum.

Hann skilir ikki, hví ætlanin skal flytast. Og hann skilir so slett ikki, at Rósa Samuelsen flytir íbúðirnar til Sandavág, sum er hennara egna heimbygd.

– Eg dugi so ikki at síggja nakra sakliga grundgeving fyri, hví tað skal byggjast akkurát í Sandavági, sigur hann.

– Orsøkin til hetta kann bara vera, at Landsstýriskvinnan vil lívga sínum egna øki og so leggur hon onki í, at ein ein góð ætlan verður smildrað sundir á vegnum.

Heðin Mortensen sigur, at hetta er bert eitt dømi afturat um, at politikarar ikki fýra fyri at smildra vælvirkandi stovnar og góðar ætlanir sundur fyri at lívga sínum egna politiska heimabeiti.

– Fáa samgongufelagarnir hjá Rósu Samuelsen ikki eyguni upp fyri hesum, hava vit ein stóran trupulleika.

– Høvuðsendamálið er ikki at fáa vælvirkandi stovnar. Høvuðsendamálið er, at tað má bara ikki vera í Havn, heldur hann.

Heðin Mortensen ger eisini púra greitt, at enn er seinasta orðið ikki sagt í hesum máli.

– Hvørki eg, ella Tórshavnar Býráð, fara at seta seg hendur í favn og lata hetta fara aftur við borðinum.

Hann sigur, at málið fer nú at vera viðgjørt í Býráðnum og tað verður eisini tikið upp til viðgerðar í Kommunusamskipan Føroya.

## 108.000 fermetrar

**Tað er á tí stóra stykkinum, har bæði Eirargarður, psykiatriska deild á Landssjúkrahúsinum, íbúðarblokkar, og aðrir bygningar hjá Heilsuverkinum standa, at ætlanin eisini hevur verið at byggja íbúðirnar til sinnisveik.**
**Stykkið er heilar 108.723 fermetrar til støddar og gongur heilt frá Frælsinum, vestur í Heygsvegin, Norður til Eystan Heyg sunnanfyri eru Velbastaðvegurin og J.C. Svabosgøta mark.**

ani hava vit hvørki hoyrt orð ella eið aftur úr Almannamálaráðnum, fyrrenn nú, tað frættist, at hon hevur strikað ætlanina, tí vit skulu hava seinkað henni so illa, at byggingin í Havn hevði verðið skotin langt út í framtíðina.

Borgarstjórin í Havn sigur, at hetta er beinleiðis ósatt.

– Bólturin hevur ligið í Almannamálaráðnum síðani 29. juni í ár, men Rósa Samuelsen hevur ongantíð spælt hann víðari.

– Tað er einasta orsøkin til, at onki hendir í málinum, leggur Heðin Mortensen afturat.

# Vístu ongan vilja

**Heðin Mortensen sigur, at veruleikin er, at Almannamálaráðið hevur onga endaliga umsókn og projekttilfar sent kommununi sum kann nýtast til at geva endaligt byggiloyvi.**

**Hann staðfestir kortini, at Almannamálaráðið og Tórshavnar býráð hava viðgjørt ætlanina í eina tíð.**

**– Undir hesi viðgerðini hevur Tórshavnar Kommuna víst á, at fyri at kunna projektera og gera atkomuvegir, mugu vit hava eina heildarætlan fyri stykkið, tí virksemið, sum skal vera á tí, verður avgerandi fyri, hvussu nógv ferðslan verður og sostatt eisini, hvussu vegirnir skulu vera.**

**– Tað einasta, vit hava biðið um, er, at landsstýrið hevur eina yvirskipaða langtíðarætlan fyri hetta stóra økið, tí tað er avgerandi fyri, hvussu ferðsluviðurskiftini verða loyst.**

**Borgarstjórin í Havn sigur, at trupulleikin er, at Landsstýrið er ongantíð komið við eini heildarætlan fyri hetta stykkið.**

**Men gjøgnum árini eru umsóknir komnar um ymsar byggingar á lítlum pørtum av stykkinum.**

**– Hjá okkum í Tórshavnar Býráðið er trupulleikin, at landsstýrið hevur arbeitt við ymsum byggiætlanum, uttan nakra sum helst heildarætlan fyri hetta stóra stykkið mitt í býnum.**

**– Samstundis hevur landsstýrið ikki víst nakran sum helst vilja til at loysa ferðsluviðurskiftini til og frá stykkinum.**

**Og, hvussu tey skulu vera, er sjálvandi treytað av tí virksemi, sum skal verða á stykkinum.**

**– Tað gera vit hvørja ferð talan er um at byggja á stórum stykkjum, tí tað er avgerandi fyri at fáa ferðsluna at ganga og eisini fyri ferðslutrygdina.**

**Heðin Mortensen sigur, at kommunan hevur ikki sett Almannamálaráðnum strangari treytir her, enn Landsverk, sum er vegamyndugleikin hjá landinum, setir øllum øðrum, sum vilja brúka størri stykki til útstykking ella bygging.**

**– Tað er heldur ikki vanligt at kommunan fer inn á eitt stykki, sum onnur eiga, at gera vegir fyri eigaran, sigur Heðin Mortensen.**

# Býráðið vil ikki dansa við

Ein orsøk til, at ætlanin at byggja íbúðir til sinnisveik nú verður flutt úr Havn til Sandavágs, er tann, at Tórshavnar Býráð hevur verið so tungt at dansa við

Rósa Samuelsen sigur, at tað hevur gingið striltið at fáa byggiloyvi til endamálið í Tórshavn.

Ein orsøk til tað er, at Tórshavnar Býráð hevur sett ymisk krøv í sambandi við innkoyringina til stykkið, har ætlanin er at byggja.

– Hesi krøv fara at seinka byggingini munandi, staðfestir Rósa Samuelsen.

Tí hevur hon gjørt av at broyta ætlanina og at byggja í deplum eins og í Suðuroy.

– Í Suðuroy verða í løtuni bygdar 10 íbúðir og eitt virknistilboð, sum hava til endamáls at samskipa alla sosialpsykiatri í Suðuroy.

– Tað er tí natúrligt, at valið fellur á Vágoy, har tað frammanundan eru tvey sambýlir. Við at byggja í Vágoy, verður farið undir sama leist sum í Suðuroynni, og samstundis verður møguleiki fyri at samskipa øll tilboðini í oynni, sigur Rósa Samuelsen.

– Grundhugsanin við deplinum í Vágum er at talan verður um eitt tilboð, har sambýlið á Traðarvegi og Fobbakletti verða búæstaðartilboð til teir veikaru bólkarnar, sum hava størri hjáveru fyri neyðini.

Samstundis skulu sambýlini so vítt møguligt verða útslúsingarstøðir og at búfólkini á sambýlunum so vítt møguligt verða fyrireikað til at flyta í sjálvstøðuga íbúð har tað ber til.

Hon sigur, at tey hava havt fund við Vága Kommunu og hon er sinnað at lata ókeypis grundstykki til byggingina.